# Innihald


| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fororð | 3 |
| 2 | Dátueftirlitið, ráðið, skrivstovan og játtanin á løgtingsfíggjarlógini | 5 |
| 3 | Arbeiðsgrundarlagið hjá Dátueftirlitinum | 6 |
| 4 | Uppgávur og virksemi í 2004 | 7 |
| | 4.1 Virksemi í árinum | 7 |
| | 4.2 Kunning | 8 |
| | 4.3 Fráboðanarskylda og viðgerðarloyvi | 8 |
| | 4.4 Lógararbeiði | 9 |
| | 4.4.1 Lógarbroytingar | 9 |
| | 4.4.2 Ummæli til lógaruppskot | 9 |
| 5 | Ávís útvald mál | 11 |
| | 5.1 Trygd | 11 |
| | 5.1.1 Fyrispurningar | 12 |
| | 5.1.2 Umsóknir um longri tillagingartíð | 13 |
| | 5.2 Skráseting av telefonsamskifti | 13 |
| | 5.3 Toll- og Skattstova Føroya fekk noktað viðgerðarloyvi | 14 |
| | 5.4 Vevmyndatól | 15 |
| | 5.5 Skuldarar skrásettir uttanlands | 17 |
| | 5.6 Elektron | 19 |
| 6 | Eftirlitsvitjanir á útvaldum stovnum | 21 |
| | 6.1.1 Blákrossheimið | 21 |
| | 6.1.2 Toll- og Skattstova Føroya | 22 |
| | 6.1.3 Almannastovan | 23 |
| | 6.1.4 Føroya Kærustovnur | 24 |
| 7 | Altjóða samstarv | 25 |
| | 7.1 Norðurlond | 25 |
| | 7.2 Hátíðarhald í Danmark | 26 |
| 8 | Givin loyvi í 2004 | 27 |
| | 8.1 Loyvi, givin til viðgerð av viðkvæmum persónsupplysingum | 27 |
| | 8.2 Loyvi, givin til at flyta persónsupplysingar av landinum | 29 |
| | 8.3 Loyvi, givin til longri tillagingartíð at lúka krøvini í trygdarkunngerðini | 30 |
| Skjal 1 | | 33 |
| Skjal 2 | | 35 |
| Skjal 3 | | 36 |

Ársfrágreiðingin 2004 hjá Dátueftirlitinum
Umbróting, repro og prent: Føroyaprent

# 1 Fororð

Dátueftirlitið, sum er sjálvstøðugur fyrisitingarligur stovnur skipaður undir Innlendismálaráðnum, umsitur Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum seinni broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004, vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin. Dátueftirlitið fevnir um Dáturáðið og avgreiðsluskrivstovuna.

Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8, í persónsupplýsingarlógini, sum ásetur, at ein av uppgávunum hjá Dátueftirlitinum er at gera árliga ársfrágreiðing.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Hetta merkir, at tað er Dátueftirlitið, sum hægsti eftirlits- og kærumyndugleiki gevur loyvi til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum eins og til at flyta persónsupplýsingar til útlond.

Persónsupplýsingarlógin hevur til endamáls at tryggja, at persónsupplýsingarnar verða handfarnar og viðgjørdar við neyðugum atliti at persónligum integriteti hjá tí einstaka, eins og at persónsupplýsingar bert verða viðgjørdar, eru tær neyðugar til tess at røkka ávísum endamáli. Somuleiðis verða krøv sett til viðgerðina, sum skulu tryggja, at persónsupplýsingarnar eru rættar og ikki koma í skeivar hendur.

Árið 2004 er triðja árið síðani Dátueftirlitið varð sett á stovn. Árið hevur verið merkt av nógvum virksemi, bæði tá talan er um at gera mannagongdir, veita kunning og vegleiðing, at málsviðgera og ikki minst at viðgera trygdarspurningar. Eisini var Dátueftirlitið á sínum fyrstu eftirlitsvitjanum í 2004.

Ársfrágreiðingin fyri 2004 greiðir frá virkseminum hjá Dátueftirlitinum. Harumframt verða útvald mál viðgjørd, og ávís øki innan persónsvernd lýst.

Tórshavn, juli 2005

Turið Debes Hentze
Forkvinna í Dáturáðnum

Marianna á Dul
Fulltrúi í Dátueftirlitinum

4

# 2 Dátueftirlitið, ráðið og skrivstovan og játtanin á løgtingsfíggjarlógini

Dátueftirlitið er sjálvstøðugur stovnur, fyrisitingarliga skipaður undir Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, valt av landsstýrismanninum í innlendismálum, og við eini skrivstovu við skrivstovufulltrúa. Limirnir í ráðnum eru persónliga valdir og umboða serkunnleika innan ymisk økir (sí skjal 1 um reglugerð fyri Dátueftirlitið).

Hesi umboða Dáturáðið:

Turið Debes Hentze, advokatur, forkvinna
Bjarni Wilhelm, fyrisitingarleiðari
Óli Hansen, løgfrøðingur

Skrivstovan hevur innivist í fyrisitingarhølum hjá Innlendismálaráðnum í Tinganesi í Tórshavn.

Fulltrúin á skrivstovuni var í 2004 Kitty May Ellefsen. Ein stóran part av árinum hevur Marianna á Dul verið barnsburðaravloysari hjá Kitty May Ellefsen.

Játtanin á fíggjarlógini í 2004 var kr. 912.000 kr. Í skjali 2 sæst ein útgreining av fíggjarjáttanini fyri øll árini, ið Dátueftirlitið hevur virkað.

# 3 Arbeiðsgrundarlagið hjá Dátueftirlitinum

Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004.

Kunngerð nr. 2 frá 8. januar 2002 um, at almennir myndugleikar bert hava fráboðanarskyldu til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum.

Kunngerð nr. 55 frá 24. apríl 2002 um, at privat bert hava fráboðanarskyldu til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum.

Kunngerð nr. 56 frá 24. apríl 2002 um, at Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum bert hava fráboðanarskyldu til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum.

Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 um flutning av persónsupplýsingum til útlond.

Kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.

Reglugerð fyri Dátueftirlitið, dagfest 27. august 2002.

**Úr gildi**:

Kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2001 um, at ikki er loyvt at flyta av landinum viðgerðarskipanir, sum nýta elektroniska dátuviðgerð av persónsupplýsingum, fór úr gildi 16.06.2003.

Kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 um flutning av persónsupplýsingum til útlond, fór úr gildi 17.05.2004.

# 4 Uppgávur og virksemi í 2004

Persónsupplýsingarlógin lýsir virksemið hjá Dátueftirlitinum. Persónsupplýsingarlógin áleggur í § 37 Dátueftirlitinum hesar uppgávur at:

- av sínum eintingum - ella eftir klagu frá skrásetta - at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands
- gera ársfrágreiðing.

## *4.1* VIRKSEMI Í ÁRINUM

Dáturáðið hevur í 2004 havt tilsamans 19 innanhýsis fundir. Dáturáðið hevur eisini í 2004 havt fundir við m.a. umboð fyri peningastovnarnar, umboð í Elektron-málinum og rættarnevndina.

Eisini møtti Dáturáðið í 2004 í Føroya Rætti í sambandi við Elektron-málið.

Eitt alsamt vaksandi tal av bæði munnligum og skrivligum fyrispurningum eins og umsóknum eru viðgjørdar í 2004. Talið av skrásettum málum í árinum er 76 í mun til 57 mál í 2003 og 44 mál í 2002. Munnligir fyrispurningar eru ikki skrásettir í árinum. Í 5. parti av frágreiðingini verður greitt nærri frá ávísum útvaldum málum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, fjøltáttaðar og umfatandi. Málsviðgerðin í Dátueftirlitinum fevnir um vegleiðing, bæði munnliga og skrivliga. Fyrispurningar kunnu vera á nógvum økjum. Tó eru ofta afturvendandi fyrispurningar. Hetta eru fyrispurningar um, hvørt upplýsingar kunnu metast sum viðkvæmar, og um ávísar viðgerðir av persónsupplýsingum fylgja ásetingunum í persónsupplýsingarlógini. Fyrispurningar hava eisini verið um trygd, treytir fyri samtykki, telefonskráseting og p-tal. Dátueftirlitið hevur í 2004 brúkt orku uppá kunning um virksemi, persónsupplýsingarlógina og vanliga málsviðgerð. Freistin at lúka treytirnar í kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, vanliga nevnd trygdarkunngerðin, var úti tann 1. september 2004. Tí er nógv av orkuni í 2004 eisini

farin til fyrispurningar viðvíkjandi trygd. Fyrispurningar hava somuleiðis verið um, hvørji fyrilit skulu takast viðvíkjandi persónsupplýsingarlógini, tá vevmyndatól verða nýtt.

Fleiri umsóknir hava verið um loyvi til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum í sambandi við granskingarætlanir, samankoyringar av skráum og at flyta persónsupplýsingar til útlond.

Fleiri spurningar og umsóknir eru viðgjørdar um telefonskráseting og nýtslu av p-talinum. Eisini hevur Dátueftirlitið givið lógartilmæli, har biðið er um tað.

2004 var eisini árið, tá Dátueftirlitið var á sínum fyrstu eftirlitsvitjanum.

## *4.2* KUNNING

Dátueftirlitið leggur kunnandi tilfar á heimasíðuna. Á heimasíðuni kann lesast um persónsupplýsingarlógina við viðmerkingum. Kunngerðir, vegleiðingar, tíðindi, orðabók og oyðubløð liggja eisini á heimasíðuni. Oyðubløð, sum skulu útfyllast, tá viðkvæmar persónsupplýsingar skulu viðgerast ella skulu flytast av landinum, kunnu útfyllast á heimasíðuni og sendast aftur til Dátueftirlitið elektroniskt.

Á heimasíðuni liggur eisini tilfar um lógargrundarlag, hvussu stovnurin er skipaður, eins og annað kunnandi tilfar.

Somuleiðis liggur ein listi yvir givin loyvir og fráboðanir á heimasíðuni.

## *4.3* FRÁBOÐANARSKYLDA OG VIÐGERÐARLOYVI

Sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini skulu allar viðgerðir, sum verða viðgjørdar elektroniskt og ella verða viðgjørdar í manuellari skrá, fráboðast Dátueftirlitinum. Við kunngerðum er fráboðanarskyldan tó avmarkað til bert at galda fyri viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum, og tá ætlanin er at flyta persónsupplýsingar av landinum. Hesar viðgerðir krevja somuleiðis viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum, áðrenn farast kann undir tær.

Í 2004 varð kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi sett í gildi. Kunngerðin hevur heimild í § 37, stk. 7, í persónsupplýsingarlógini. Henda kunngerð ásetur, at onki viðgerðarloyvi krevst frá Dátueftirlitinum, tá ið advokatar ella grannskoðarar, sum liður í sínum virksemi, viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, sum einans viðvíkja viðurskiftum hjá viðskiftafólki teirra. Tá ið læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, tannlæknar, kliniskir tanntøkningar, apotekarar, viðgerar, kiropraktorar og tílíkir persónar við løggilding til at útinna virksemi innan heilsu- og sjúkrarøkt viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, sum einans verða nýttar sum liður í hesum virksemi. Og tá ið almennir stovnar viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, tá viðgerðin hevur heimild í lóg. Hóast hesar viðgerðir av viðkvæmum persónsupplýsingum eru undantiknar loyviskravinum, skulu hesar viðgerðir fráboðast Dátueftirlitinum.

Á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum liggja tvey umsóknarbløð til viðgerðarloyvi - eitt til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum og eitt til flutning av persónsupplýsingum til útlond.

Dátueftirlitið hevur í 2004 givið fimm loyvi til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum, og fimm loyvi til at flyta persónsupplýsingar av landinum. Talið av galdandi loyvum, sum Dátueftirlitið í alt hevur givið, er nú sjey viðgerðarloyvi til viðkvæmar persónsupplýsingar og 18 loyvi til at flyta persónsupplýsingar til útlond. Ein listi yvir givin loyvi í 2004 er í 8. parti í hesi frágreiðing.

### 4.4 LÓGARARBEIÐI

#### 4.4.1 LÓGARBROYTING

Persónsupplýsingarlógin er broytt í árinum. Løgtingið viðtók uppskot frá Innlendismálaráðnum um broyting í Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum. Lógarbroytingin kom í gildi 17. mai 2004.

Orsøkin til hesa lógarbroyting var tað kjak og teir trupulleikar, ið stóðust av ásetingunum í persónsupplýsingarlógini viðvíkjandi flutningi av persónsupplýsingum til útlond.

Endamálið við lógarbroytingini var, at tað í framtíðini einans skuldu vera trygdaratlit, sum vóru avgerandi, tá persónsupplýsingar verða fluttar av landinum. Tær ásetingar viðvíkjandi flutningi til útlond, sum ikki høvdu við trygd at gera, vórðu strikaðar úr lógini.

Mett varð, at tað ikki var hóskandi at hava forðingar í persónsupplýsingarlógini, sum bara vóru galdandi fyri t.d. peningastovnarnar, og sum kundu virka sum vinnupolitiskar forðingar.

Harafturat varð ásett, at landsstýrismaðurin eftir at hava fingið ummæli frá Dátueftirlitinum kundi gera reglar fyri, hvørji útlond persónsupplýsingar kunnu flytast til, uttan at loyvi krevst frá Dátueftirlitinum. Her er ætlanin, at tað skal verða møguligt at vísa á nøkur sokallað ”trygg lond”. Tey sokallaðu ”tryggu londini” verða tey, sum landsstýrismaðurin við kunngerð lýsir trygg, og kunnu persónsupplýsingar frítt flytast til hesi lond uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.

Fyri at røkka hesum endamáli, varð §16 broytt og §17, stk 3 í persónsupplýsingarlógini strikað og hevði tað við sær, at heimildin fyri kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 um flutning av persónsupplýsingum ikki var tilstaðar og fór kunngerðin úr gildi tann 17. mai 2004.

#### 4.4.2 UMMÆLI TIL LÓGARUPPSKOT

Dátueftirlitið fekk í 2004 lógaruppskot um gransking í mannaílegum (ílegulógin) til ummælis.

Dátueftirlitið hevði fleiri viðmerkingar til lógaruppskotið. Nevnast kann, at ymisk heiti gingu aftur í ávikavist hesum lógaruppskoti og persónsupplýsingarlógini, t.d. navnloynd og viðkvæmar persónsupplýsingar, tó vóru hugtøkini ikki lýst á sama hátt. Dátueftirlitið metti, at hesi heiti skuldu lýsast betri fyri at fyribyrgja møguligari andsøgn.

Dátueftirlitið hevði eisini viðmerkingar til rættin hjá tí einstaka persóninum. Lógaruppskotið byrjaði við, at endamálið var vernd hjá tí einstaka persóninum. Tó hvarv einstaklingurin úr lógartekstinum, og dentur varð heldur lagdur á einkarættin hjá stovninum at útvega sær einstaklingaupplýsingar úr sjúklingaskráum og at gera sáttmálar við triðjaper-

sónar. Dátueftirlitið setti spurnartekin við, hvørjar avmarkingar vóru viðvíkjandi rættinum hjá tí einstaka at ráða yvir egnum persónsupplýsingum, orsakað av lógásetta einkarættinum í lógarupp-skotinum.

Dátueftirlitið skilti á lógaruppskotinum, at tað var Dátueftirlitið, ið skuldi vera eftirlitsmyndugleiki og góðkenna granskingarverkætlanir. Dátueftirlitið viðmerkti, at Dátueftirlitið ikki góðkendi granskingarverkætlanir, men kannaði eftir um lógarkrøvini verða fylgd í sambandi við viðgerðina av persónsupplýsingum.

# 5 Ávís útvald mál

Í hesum parti av ársfrágreiðingini verður í stuttum greitt frá nøkrum fáum av teimum 76 málunum, sum Dátueftirlitið hevur viðgjørt í 2004, eins og greitt verður frá ávísum útvaldum økjum innan persónsvernd.

Stór orka hevur verið nýtt til trygdarspurningar í farna ári, tí at freistin at lúka ásetingarnar í trygdarkunngerðini var ásett til 1. september 2004. Fleiri fyrispurningar hava eins og undanfarnu ár eisini verið um telefonskráseting. Greitt verður frá málsviðgerðini av eini umsókn um viðgerðarloyvi til viðkvæmar persónsupplýsingar, sum varð noktað, og frá málsviðgerðini av einum fyrispurningi um vevmyndatól. Eitt mál um kredittupplýsingar, sum Dátueftirlitið sbrt. § 37, nr. 1, í persónsupplýsingarlógini tók upp av sínum eintingum, verður nærri lýst. Greitt verður eisini frá teimum avleiðingum, broytingarnar í persónsupplýsingarlógini í 2004 hava havt fyri Elektron-málið, sum hevur verið eitt afturvendandi mál øll tey árini, Dátueftirlitið hevur virkað.

## *5.1* TRYGD

Tá talan er um viðgerð av persónsupplýsingum, hevur trygdin altavgerandi týdning. Við heimild í § 31 í persónsupplýsingarlógini varð kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum sett í gildi (sí skjal 3). Sambært § 17, stk. 1, í kunngerðini skuldu upplýsingarkervi, sum eru fevnd av kunngerðini, innan 1. september 2004 lúka treytirnar í trygdarkunngerðini.

Í § 31 í persónsupplýsingarlógini er álagt dátuábyrgdara í dagligu leiðsluni at syrgja fyri nøktandi tekniskari og fyrisitingarligari trygd, tá ið persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Tað inniber, at dátuábyrgdari skal syrgja fyri, at nóg góður trygdarfakligur førleiki er tøkur til dátuviðgerðina. Afturat ábyrgdini fyri trygdini í egnari skipan, skal dátuábyrgdarin eisini tryggja, at trygdin er nøktandi hjá samstarvsfeløgum og veitarum.

Trygdin fevnir um trúnaðartrygd, integritetstrygd og atgeingistrygd. Trúnaðartrygdin skal vera ein vernd ímóti, at óviðkomandi fáa innlit í persónsupplýsingarnar. Integritetstrygdin skal verja ímóti ótilætlaðum broytingum av persónsupplýsingum. Atgeingistrygd er trygd fyri, at persónsupplýsingar eru tøkar, sum eru nøktandi og viðkomandi.

Trygdarkunngerðin setur krøv til skipanir, sum dátuábyrgdarin skal seta í verk fyri at fáa nøktandi trygd. Kravið um trygdarleiðslu er ein týdningarmikil liður í hesi skipan.

Leiðslan skal fremja trygdarábøtur við at lýsa

trygdarmálini. Trygdarmálini skulu fevna um viðtøkur til ávikavist hvat ella hvussu upplýsingarkervið skal nýtast. Tílíkar viðtøkur kunnu vera, hvørjar viðgerðir av persónsupplýsingum skulu gerast elektroniskt, umframt hvussu virkið ella stovnurin ber seg at, tá ið persónsupplýsingar, sum skulu tryggjast, verða viðgjørdar. Eisini skulu reglur gerast fyri, hvussu starvsfólk kunnu nýta skipanina til egna nýtslu.

Trygdartiltøkini og sjálvt upplýsingarkervið skulu vera skjalprógvað. Skjalprógvið skal fevna um lýsing av trygdarskipan, mannagongdir fyri nýtslu og skráseting av gerðum.

Krøvini í trygdarkunngerðini skulu lúkast, áðrenn viðgerðin av persónsupplýsingum kann setast í verk. Dátuábyrgdarin skal skjalprógva skipanina og trygdina til egna nýtslu. Um viðgerðarloyvi krevst sbrt. § 35 í persónsupplýsingarlógini, skulu partar av skjalprógvum leggjast við umsóknini. Um viðgerðin einans skal fráboðast, skal skjalprógv ikki sendast við. Dátueftirlitið kann í øllum førum biðja um skjalprógv. Krøvini í trygdarkunngerðini eru nógv og víðfevnd, og ikki ber til at fara út í æsir við teimum her.

### 5.1.1 FYRISPURNINGAR

Freistin til at lúka treytirnar í trygdarkunngerðini fyri upplýsingarkervi, fevnd av trygdarkunngerðini, var úti 1. september 2004. Í hesum sambandi fekk Dátueftirlitið fleiri fyrispurningar um trygdarkunngerðina. Fyrispurningar vóru bæði frá privatum virkjum eins og almennnum stovnum. Eisini vóru fyrispurningar frá grannskoðarum og KT-veitarum, sum virki og stovnar høvdu biðið taka sær av treytunum í trygdarkunngerðini. Fyrispurningar vóru m.a. um, nær eitt upplýsingarkervi er fevnt av trygdarkunngerðini og eisini um vegleiðing til, hvussu trygdarkunngerðin skuldi skiljast. Fleiri spurdu eftir ávísum leistum fyri, hvussu júst teirra upplýsingarkervi kundi tryggjast. Eisini vóru tað tey virki og stovnar, ið vildu hava eina skraddaraseymaða trygdarloysn frá Dátueftirlitinum.

Trygdarkunngerðin er breitt orðað, og vilja tí krøvini til trygd vera ymisk, alt eftir hvørja viðgerð av persónsupplýsingum, talan er um. Tí er ógjørligt hjá Dátueftirlitinum at hava eina skraddaraseymaða trygdarloysn fyri, hvørji trygdartiltøk virki og stovnar skulu seta í verk fyri at lúka treytirnar í trygdarkunngerðini. Trygdarskipanirnar eiga at verða gjørdar við atliti at teimum persónsupplýsingum, sum verða viðgjørdar, og verður skipanin av tí sama ymisk, alt eftir hvørji virki/stovnar, talan er um.

Trygdarkunngerðin áleggur, at trygdartiltøk verða sett í verk, tá ið persónsupplýsingar verða viðgjørdar elektronisk. Tá mett verður um, hvørji trygdartiltøk eru neyðug, er av týdningi sambært § 1 í trygdarkunngerðini at meta um slagið av upplýsingum og vandanum fyri missi av lívi og heilsu, fíggjarligum tapi ella av umdømi og persónligum integriteti, sum viðgerðin førir við sær. Sambært viðmerkingunum til persónsupplýsingarlógina, eru ongi formlig krøv sett til trygdarfyriskipanir. Trygdarskipanir eiga at verða gjørdar eftir ítøkiligum metingum av teimum persónsupplýsingum, sum verða viðgjørdar, í mun til ta hóttan, sum er ímóti trygdini. Henda váðameting skal gerast av dátuábyrgdaranum.

Dátuábyrgdarin skal gera váðametingina fyri at fáa greiðu á tí váða, ið viðgerðin kann hava við sær, við atliti at tørvinum á trúnaði, integriteti og atgongd. Úrslitið av váðametingini skal berast saman við støðið fyri loyvdum váða, sum dátu-ábyrgdarin frammanundan hevur sett. Eftir eina tílíka samanbering skal dátuábyrgdarin, um tað er neyðugt, seta tiltøk í verk fyri at bøta um trygdina. Dátueftirlitið kann áleggja einum dátuábyrgdara at tryggja persónsupplýsingar og áseta mørk fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

### 5.1.2 UMSÓKNIR UM LONGRI TILLAGINGARTÍÐ

Dátueftirlitið kann sbrt. § 17, stk. 2, í trygdarkunngerðini í serligum førum geva eina longri tillagingartíð enn tað ásetta tíðarskeiðið í trygdarkunngerðini, tó í mesta lagi tvey ár, og bert um vísast kann á eina tilskilaða ætlan fyri, hvussu krøvini í trygdarkunngerðini væntandi verða lokin. Í hesum sambandi hevur Dátueftirlitið í 2004 móttikið 20 umsóknir um longri tillagingartíð, sjey av hesum umsóknum eru í 2004 játtaðar. Í 8. parti í hesi frágreiðing er ein listi yvir tey, ið hava fingið játtað longri tillagingartíð í 2004.

Í málsviðgerðini av umsóknum um longri tillaging-artíð til freistina í trygdarkunngerðini hevur Dátueftirlitið lagt serligan dent á § 17, stk 2, í trygdarkunngerðini. Henda grein ásetur, at longri tillagingartíð bert kann gevast í serligum førum, og bert um vísast kann á tilskilaða ætlan yvir, hvussu krøvini í trygdarkunngerðini væntandi verða lokin. Dáturáðið avgjørdi á fundi 3. september 2004 at skilja orðingina "tilskilaða ætlan" sum eina útgreinaða tíðarætlan yvir, hvussu krøvini í trygdarkunngerðini væntandi verða lokin. Dátueftirlitið hevur tí bert játtað umsóknir, har vísast kundi á eina slíka útgreinaða tíðarætlan, samstundis sum greitt varð frá, hvørjar serligar umstøður vóru orsøk til, at søkt varð um longri tillagingartíð. Tey, ið sendu inn umsóknir, har ikki kundi vísast á eina slíka tíðarætlan, fingu boð um at koma við eini tilskilaðari tíðarætlan, áðrenn umsóknin varð endaliga viðgjørd.

### 5.2 SKRÁSETING AV TELEFONSAMSKIFTI

Serligar reglur eru í persónsupplýsingarlógini um skráseting av telefonsamskifti hjá starvsfólki. Persónsupplýsingarlógin § 15 er um vernd av starvsfólki í sambandi við telefonsamskifti teirra í starvi hjá bæði privatum og almennum arbeiðsgevara. Dátueftirlitið fær tíðum fyrispurningar og umsóknir um telefonskráseting.

Greinin fevnir bert um sjálvvirkandi skráseting og forðar sostatt ikki fyri manuellari skráseting. Loyvt er at skráseta talið av samrøðum og hvussu nógv talutíð verður brúkt, eins og eisini er loyvt sjálvvirkandi at skráseta soleiðis, at nøkur av tølunum í sekstals-telefonnummarinum ikki verða upplýst, so at ikki kann kennast aftur, hvønn ringt verður til. Tað er sostatt bert, hvønn nágreiniliga ringt verður til, ið ikki er loyvt at skráseta sjálvvirkandi.

Dáturáðið hevur viðgjørt spurningin um, hvussu privatlívið best verður vart, tá ið uppringdar samrøður verða skrásettar sjálvvirkandi. Við atliti til, at Føroyar eru eitt lítið samfelag, og tí mugu metast at hava serligan tørv á persónsvernd, hevur

Dáturáðið, við heimild í § 15, stk. 1, í persónsupplýsingarlógini, gjørt av, at trý tey seinastu tølini í telefonnummarinum ikki skulu upplýsast.

Meginreglan er sostatt, at tað ikki er loyvt sjálvvirkandi at skráseta, hvønn starvsfólk samskifta við, men at Dátueftirlitið kann geva loyvi til sjálvvirkandi skráseting, um altýðandi privat ella almenn áhugamál krevja tað.

Henda orðing skal skiljast nágreiniliga og verður tulkað soleiðis, at Dátueftirlitið bert undir heilt serligum umstøðum veitir loyvi, og at ávísingar til illgruna um ovurnýtslu av telefonini vanliga ikki verður mett sum nóg góð grundgeving fyri at veita loyvi. Í metingini av, um altýðandi áhugamál eru, verður mett um, hvat endamálið er, hvussu týðandi hetta er í mun til persónsverndina og um endamálið kann røkkast á annan hátt.

Undir hvørjum treytum Dátueftirlitið gevur loyvi til sjálvvirkandi skráseting av samskifti hjá starvsfólki, verður avgjørt fyri hvørt málið sær, og kann tí longu av hesi orsøk ikki roknast við einum standardloyvi. Loyvi skal fáast í hvørjum einstøkum føri. Viðmerkjast kann eisini, at roknast kann bert við loyvi virkandi fyri framtíðina og neyvan afturvirkandi, uttan so at serlig lógarheimild er.

Í 2004 hava fleiri virki og stovnar søkt um at fáa telefonrokningina útgreinaða. Eingin hevur tó fingið loyvi, við tað at flestu umsóknir høvdu til endamáls at avdúka privata nýtslu hjá starvsfólkunum. Arbeiðsgevarin eigur at gera reglur fyri starvsfólkini um privata telefonnýtslu, bæði tá talan er um vanliga telefon og fartelefon. Um so er, at serligur tørvur er at fáa uppgjørt, í hvønn mun starvsfólkini nýta arbeiðstelefonina í frítíðini, so kann hetta gerast á annan hátt enn við at útgreina telefonrokningina.

Ein av umsóknunum um at fáa telefonrokning í 2004 útgreinaða varð viðgjørd av Dáturáðnum. Umsóknin var frá einum handverkara, ið hevði eitt einstaklingavirki. Søkt varð um at fáa upplýst, hvørji telefonnummur hansara arbeiðsfartelefon hevði sent sms til.

Dáturáðið hevur fyrr viðgjørt fyrispurningar viðvíkjandi fartelefonum og avgjørt, at somu reglur eru galdandi fyri fartelefonir sum fyri vanligar telefonir. Dáturáðið metti í sambandi við henda fyrispurning, at sms má metast sum telefonsamskifti, og er tí eisini fevnt av § 15 í persónsupplýsingarlógini.

Ásetingin í § 15 kann bert nýtast, tá talan er um verulig starvsfólka- og leiðsluviðurskifti. Dáturáðið vísti tó á, at § 15 ikki kann nýtast, tá talan er um einstaklingavirki, hetta stendur í serligu viðmerkingunum til greinina. Við tað, at § 15 ikki kundi nýtast, var í hesum førinum ikki neyðugt at søkja um loyvi frá Dátueftirlitinum fyri at fáa eina útgreinaða telefonrokning.

### 5.3 TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA FEKK NOKTAÐ VIÐGERÐARLOYVI

Ein umsókn um viðgerðarloyvi til viðkvæmar persónsupplýsingar varð noktað av Dátueftirlitinum. Toll- og Skattstova Føroya søkti í mars 2004 um loyvi at viðgera viðkvæmar

persónsupplýsingar. Endamálið við viðgerðini var at skráseta persónar við mynd, sum høvdu brotið lógina um euforiserandi evnir við at innflyta ólóglig rúsandi evni. Henda skráseting skuldi nýtast sum liður í eftirlitsarbeiðinum.

Talan var um persónsupplýsingar um revsiverd viðurskifti, og metti Dátueftirlitið tí, at málið hevði serligan prinsipiellan týdning. Málið varð viðgjørt av Dáturáðnum. Í málsviðgerðini kannaði Dátueftirlitið hvønn leist hini Norðurlondini nýttu, tá tey viðgjørdu mál av slíkum slagi. Eisini setti Dátueftirlitið seg í samband við løgregluna fyri at fáa greiðu á, hvørjar treytir eru galdandi, tá løgreglan goymir myndir av persónum, sum hava framt lógarbrot.

Dáturáðið metti, at persónsupplýsingar um revsiverd viðurskifti eru sera viðkvæmar, tí mugu serligar reglar vera galdandi á hesum øki. Trupulleikar, sum Dáturáðið serliga hefti seg við, snúðu seg um goymslu av myndunum, fyrning av persónsupplýsingunum og trygdarviðurskifti, tá ið slíkar upplýsingar verða viðgjørdar. Dátuáðið metti ikki, at heimild var í §§ 9 og 10 í persónsupplýsingarlógini til ætlaðu viðgerðina av viðkvæmum persónsupplýsingum.

Dátueftirlitið vísti í avgerð síni á, hvussu slík mál verða viðgjørd í okkara grannalondum.

Í Íslandi er ein líknandi skipan á flogvøllinum í Keflavík, har talgildar myndir verða tiknar av øllum ferðafólkum, ið ferðast um flogvøllin. Hetta er ein skipan, sum er heimilað í aðrari lóggávu enn tí íslendsku persónsupplýsingarlógini.

Í Danmark verður loyvi bert givið eftirlitsstovnum at viðgera persónsupplýsingar um revsiverd viðurskifti, um so er at tann avvarðandi myndugleikin hevur greiða lógarheimild til eftirlit, um so er at brotið á lógina verður staðfest við revsing, og um so er at upplýsingarnar um revsiverd viðurskifti eru neyðugar fyri at fremja eftirlitsarbeiðið.

Í Noregi verður mælt til, at tá eftirlitsstovnar skulu viðgera persónsupplýsingar um revsiverd viðurskifti, eru hetta ikki mál, ið norska Dátueftirlitið skal taka støðu til. Heldur eigur eitt slíkt mál at verða reist í Stórtinginum, so at serlóggáva verður gjørd.

Dátuáðið vísti somuleiðis á, at løgreglan hevur sera neyvar reglur at ganga eftir, tá myndir verða tiknar av skuldsettum. Henda viðgerð er heimilað í rættargangslógini. Løgreglan kann bert taka myndir, um revsingin fyri tað brot, ið persónurin er skuldsettur fyri, minst gevur 1 ár og 6 mðr. í hefti. Myndirnar kunnu bert goymast, um tann skuldsetti verður dømdur sekur, og skulu ikki goymast longur enn 12 ár.

Dátuáðið metti, at tá so greiðar reglur eru galdandi fyri løgregluna, mugu í minsta lagi somu reglur verða galdandi fyri Toll- og Skattstovu Føroya, tá teir taka myndir av persónum, ið fremja brot á lógina um euforiserandi evnir.

### *5.4* VEVMYNDATÓL

Eitt tíðarkrevjandi mál í árinum var málið um vevmyndatólið hjá Strandfaraskipum Landsins (hereftir stytt SL). Í juli 2004 fekk Dátueftirlitið ein

fyrispurning frá SL, ið spurdi, um teirra vevmyndatól, ið var sett upp á kaiøkinum í Klaksvík, var fevnt av persónsupplýsingarlógini. Endamálið við vevmyndatólinum var, at starvsfólk hjá SL og almenningurin kundu fylgja raðnum av bilum, ið bíðaðu eftir at sleppa yvir fjørðin til Leirvíkar. SL vísti á, at hetta var eitt hent amboð, av tí at trýstið á hesa farleið var rættiliga stórt, og SL ikki hevði eina bíleggingarskipan.

Hetta var fyrstu ferð, at Dátueftirlitið fekk ein fyrispurning viðvíkjandi vevmyndatóli, tí varð hetta mál viðgjørt í Dáturáðnum.

Dáturáðið kom til ta niðurstøðu, at vevmyndatólið var fevnt av persónsupplýsingarlógini, og at nýtslan ikki var í samsvari við ásetingarnar í lógini. Í svari til SL vóru grundgevingarnar hesar:

Dáturáðið metti, at talan var um persónsupplýsingar sambært § 2, nr. 1, í persónsupplýsingarlógini, har ásett er, at persónsupplýsing er ein og hvør meting, knýtt at einum ávísum persóni. Í serligu viðmerkingunum til hesa grein stendur skrivað, at hugtakið persónsupplýsingar fevnir um allar persónsupplýsingar, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu knýtast at einum persóni, sum kann kennast aftur. Dáturáðið metti, at Føroyar eru eitt lítið samfelag, tí skal ikki nógv til, áðrenn ein persónur kann kennast aftur á mynd. Um bert fáir persónar kunnu kenna ein persón aftur eftir teimum upplýsingum, sum eru tøkar, so eru upplýsingarnar fevndar av persónsupplýsingarlógini. Dáturáðið metti, at hóast sjálvt andlitið ikki sást týðuliga á myndunum hjá SL, so vóru onnur eyðmerki sjónlig - eitt nú likamsbygnaður og klæðir, og tá hesir persónar kundu setast í samband við bilar, har bæði bilmerki og litur týðuliga sást, bar væl til at eyðmerkja persónar á myndunum.

Sambært persónsupplýsingarlógini § 8, nr. 2, mugu persónsupplýsingar bert savnast til eitt nágreiniligt tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans. Nágreiniligt tilskilað endamál merkir, at dátuábyrgdarin í sambandi við innsavnanina av persónsupplýsingum skal greina endamálið so væl, at eingin ivi er um, hvør ætlanin við viðgerðini er. Ein almenn lýsing av endamálinum, so sum “fyrisitingarlig endamál” ella “viðskiftaendamál” er ikki nøktandi at lúka kravið um nágreiniliga tilskilan. Eitt sakligt endamál er eitt endamál, sum liggur innan tað natúrliga virkisøkið, sum virkið/stovnurin hevur.

Harafturat ásetur § 8, nr. 3, í persónsupplýsingarlógini, at persónsupplýsingar bert kunnu viðgerast, um hesar eru viðkomandi og neyðugar og ikki fevna um fleiri persónsupplýsingar enn tær, sum krevjast fyri at røkja endamálinum við innsavnanini og teirri víðari nýtsluni av persónsupplýsingunum. Persónsupplýsingarnar mugu bert vera tílíkar, sum eru neyðugar og av týdningi til ætlaðu viðgerðina.

Dáturáðið var av teirri áskoðan, at endamálið og grundgevingin fyri nýtslu av vevmyndatóli á kaiøkinum í Klaksvík skuldi lýsast betri. Eisini vísti Dáturáðið á, at vevmyndatólið vísti meira enn bert bilaraðið á kaiøkinum í Klaksvík, og sostatt eisini fleiri persónsupplýsingar enn kravdust fyri at røkka endamálinum við vevmyndatólinum, t.d. sást eisini almennur vegur á myndini. Dáturáðið heitti á SL

um at greina nærri, hvat endamálið við viðgerðini var, og hvussu persónsupplýsingarnar kundu avmarkast til bert at umfata tær, ið vóru neyðugar til at røkka endamálinum, og kanska viðgera upplýsingarnar á ein slíkan hátt, at persónar ikki kundu kennast aftur.

Loksins gjørdi Dáturáðið eisini vart við, at tá persónsupplýsingar verða innsavnaðar og viðgjørdar, ásetur lógin, at teir skrásettu persónarnir frammanundan skulu hava kunning um skrásetingina, t.v.s., at sum eitt minsta krav eigur at skeltast við skrásetingini á sjónligum støðum.

Niðurstøðan varð, at vevmyndatólið ikki lúkaði treytirnar í persónsupplýsingarlógini. Dáturáðið heitti tí á SL um at sløkkja fyri vevmyndatólinum, til málið varð liðugt viðgjørt í einum komandi samskifti millum Dáturáðið og SL.

SL setti seg eftir hetta í samband við Dáturáðið og greiddi frá, at tað var sera óheppið at sløkkja fyri vevmyndatólinum. Vevmyndatólið er ein kundatænasta, sum SL veitir, og verður henda tænasta nógv nýtt av viðskiftafólkunum. SL lýsti endamálið við viðgerðini betri, og broytti eisini myndina soleiðis, at myndagóðskan varð verri, samstundis sum at myndin nú varð gjørd svørt og hvít. Hetta varð gjørt fyri at persónar ikki skuldu kennast aftur á myndunum.

Dáturáðið metti, at lýsta endamálið við viðgerðini nú var nøktandi og sakliga grundað í virkseminum hjá SL. Dáturáðið metti eisini, at heimild var fyri viðgerðini í § 9, stk. 1, nr. 6, í persónsupplýsingarlógini, ið ásetur, at persónsupplýsingar kunnu viðgerast, um viðgerðin er neyðug til tess av røttum at kunna fylgja einum sjálvsagt heimilaðum áhugamáli hjá dátuábyrgdaranum, og fyrilitini fyri skrásetta ikki eru eins stór og hesi áhugamál.

Tó metti Dáturáðið, at myndirnar enn vóru fevndar av persónsupplýsingarlógini, og skuldi viðgerðin av persónsupplýsingum eisini lúka ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini. Hóast myndagóðskan varð gjørd munandi verri, kundu persónar tó enn eyðmerkjast á myndunum. Vevmyndatólið vísti meira enn bert bilaraðið, og tí eisini fleiri persónsupplýsingar enn neyðugt fyri at røkka endamálinum. Tí heitti Dáturáðið enn einaferð á SL um antin at avmarka myndina til bert at umfata sjálvt bilaraðið, ella at broyta myndagóðskuna enn meira, so persónar ikki kunnu kennast aftur. Samstundis minti Dáturáðið enn einaferð SL á, at tey skrásettu sbrt. § 8 í persónsupplýsingarlógini skulu kunnast um viðgerðina av persónsupplýsingum. Dáturáðið heitti á SL um at seta skelti upp, har kunnað verður um, at økið verður avmyndað við vevmyndatóli. Um skelti verður sett upp, og myndin avmarkað, so bert bilaraðið sæst, metir Dáturáðið viðgerðina vera í samsvari við persónsupplýsingarlógina. Málið varð ikki endaliga avgreitt í 2004.

### 5.5 SKULDARAR, SKRÁSETTIR UTTANLANDS

Eftir umtalu í fjølmiðlunum tók Dátueftirlitið sbrt. § 37, nr. 1, í persónsupplýsingarlógini eitt mál upp av sínum eintingum. Málið snúði seg um, at føroyskir peningastovnar skrásettu skuldarar í danska RKI Kredit Information A/S (vanliga nevnt Ribers ella RKI). Dátueftirlitið fekk váttað bæði frá Innlendismálaráðnum og RKI, at ávísur føroyskur

peningastovnur skrásetti skuldarar í skránni hjá RKI.

Persónsupplýsingarlógin ásetur í § 9, stk. 2, at viðgerð av persónsupplýsingum um láns- og fíggjarviðurskifti hjá skrásetta fyri at ávara onnur um handilssamband við skrásetta ella um starvsviðurskifti við skrásetta, krevur samtykki frá skrásetta. Dátueftirlitið sendi tí skriv út til allar føroyskar peningastovnar, har heitt varð á peningastovnarnar um sum skjótast at upplýsa, hvørt peningastovnurin uttan samtykki frá skrásetta framdi skráseting hjá RKI ella øðrum líknandi feløgum, sum høvdu til endamáls at ávara onnur um handilssambond við skrásetta.

Allir peningastovnarnir uttan Føroya Banki svaraðu, at teir ikki skrásettu skuldarar í RKI ella í líknandi feløgum. Einasti peningastovnur í Føroyum, ið játtaði, at peningastovnurin flutti persónsupplýsingar um skuldarar til RKI, var Føroya Banki.

Dátueftirlitið sendi tí Føroya Banka eitt skriv, har kunnað varð um galdandi lóggávu á økinum. Tað er ásett í § 2, nr. 2, í persónsupplýsingarlógini, at viðgerð er øll nýtsla, so sum savnan, skráseting, samkoyring, varðveitsla, víðarigeving, avhending v.m. ella ein sameining av hesum. Tí er talan um eina viðgerð av persónsupplýsingum, sum er fevnd av persónsupplýsingarlógini, tá Føroya Banki víðarigevur persónsupplýsingar um skuldarar til RKI. Viðgerðin skal fylgja teimum ásetingum, sum persónsupplýsingarlógin ásetur.

Persónsupplýsingarlógin ásetur greitt í § 9, stk. 2, at samtykki krevst frá skrásetta til viðgerð av persónsupplýsingum um láns- og fíggjarviðurskifti hjá skrásetta fyri at ávara onnur um handilssamband við skrásetta ella starvsviðurskifti við skrásetta. Hetta merkir, at Føroya Banki ikki hevur loyvi at víðarigeva slíkar persónsupplýsingar til RKI, uttan at samtykki frammanundan er fingið frá tí skrásetta.

Um endamálið við víðarigevingini ikki er at ávara onnur, men t.d. at innheinta skuld, so kann heimild vera fyri slíkari viðgerð í persónsupplýsingarlógini. Tó mugu hesar persónsupplýsingar ikki verða nýttar til onnur endamál enn tað upprunaliga. Tí eigur dátuábyrgdarin, í hesum førinum Føroya Banki, at tryggja sær, at persónsupplýsingarnar ikki verða nýttar til eitt annað endamál, eitt nú at ávara onnur um handilssamband. Hetta merkir, at um ein føroyskur peningastovnur víðarigevur persónsupplýsingar um láns- og fíggjarviðurskifti hjá sínum viðskiftafólkum til eitt nú RKI, eigur peningastovnurin sum dátuábyrgdari at tryggja sær, at RKI ikki nýtir hesar persónsupplýsingar til at ávara onnur um handilssamband við skrásetta, uttan so at samtykki frammanundan er fingið um hetta frá skrásetta.

Harafturat kunnaði Dátueftirlitið Føroya Banka um, at sbrt. § 16 og § 35, stk. 6, í persónsupplýsingarlógini, er ikki loyvt at flyta persónsupplýsingar til útlond, uttan at loyvi frammanundan er fingið frá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið heitti á Føroya Banka, vísandi til § 27 í persónsupplýsingarlógini, um at steðga flutninginum av persónsupplýsingum til RKI Kredit Information A/S, og samstundis boða RKI frá, at

persónsupplýsingarnar eru ólógligt viðgjørdar og tí skulu strikast.

Í svarskrivi sínum vísti Føroya Banki á, at persónsupplýsingarnar einans fevndu um viðskiftafólk, búsitandi í Danmark, og tí ikki vóru føroyskir persónsupplýsingar, ofta vóru hesi viðskiftafólk eisini frammanundan skrásett hjá RKI. Føroya Banki metti ikki, at ein føroyskur peningastovnur skuldi vera verri stillaður enn danskir peningastovnar, sum eru fevndir av danskari lóggávu.

Dátueftirlitið metti ikki hetta hava týdning fyri niðurstøðuna í málinum, og heitti tí enn einaferð á Føroya Banka um at steðga við at flyta persónsupplýsingar til RKI, tí viðgerðin er í stríð við føroyska lóggávu. Málið varð ikki endaliga avgreitt í 2004.

5.6 ELEKTRON

Eitt av afturvendandi drúgvu málinum, síðani Dátueftirlitið varð sett á stovn tann 1. januar 2002, er Elektron-málið.

Málið snýr seg í stuttum um, at Elektron í sambandi við gerð av nýggjari gjaldskipan í 2002 søkti um loyvi at flyta persónsupplýsingar til Pengeinstitutternes BetalingsService (PBS) í Danmark. Upplýsingarnar, ið flytast skuldu til Danmarkar, vóru vanligar persónsupplýsingar og ikki viðkvæmar persónsupplýsingar.

Í viðgerðini av málinum skuldi støða takast til, um flutningurin var fevndur av kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2001 um flutning av persónsupplýsingum til útlond, ið ásetur forboð fyri at viðgerðarskipanir, ið nýta elektroniska dátuviðgerð av persónsupplýsingum, kunnu flytast av landinum.

Tað avgerandi í málinum var, hvørt talan var um eina viðgerðarskipan sbrt. § 1 í kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2001, ið skuldi flytast av landinum. Niðurstøðan hjá Dáturáðnum var, at talan var ikki um eina viðgerðarskipan sbrt. § 1 í kunngerðini. Av tí sama kundi kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2001, so sum hon var orðað, ikki nýtast í málsviðgerðini av umsóknini. Kunngerðin gav ikki Dátueftirlitinum heimild til at nokta Elektron at flyta persónsupplýsingar til Danmarkar í sambandi við gjaldskipanina.

Av tí at flutningurin av persónsupplýsingunum ikki var fevndur av forboðnum í kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2001, varð málið viðgjørt eftir persónsupplýsingarlógini § 16, ið m.a. ásetur, at persónsupplýsingar bert kunnu flytast til útlond, sum kunnu tryggja eina fullgóða viðgerð av persónsupplýsingunum. Dáturáðið kom til niðurstøðuna, at treytirnar í § 16 vóru loknar. Tann 13. juni 2002 gav Dáturáðið Elektron loyvi at flyta persónsupplýsingar til Danmarkar í sambandi við gjaldskipanina.

Síðani kom nýggj kunngerð í 2003, kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 um flutning av persónsupplýsingum til útlond. Við støði í nýggju kunngerðini tók Dáturáðið givna loyvið upp til nýggja viðgerð. Dáturáðið avgjørdi tann 28. oktober 2003, við grundarlagi í fyrisitingarrætti, ikki at taka loyvið aftur. Harafturímóti avmarkaði Dáturáðið við heimild í § 2, stk. 1, í kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 givna loyvið hjá Elektron, soleiðis at ikki varð

loyvt at flyta av landinum aðrar persónsupplýsingar enn tær, sum longu vóru viðgjørdar og fluttar av landinum. Hetta hevði við sær, at tað ikki bar til at knýta nýggjar kundar í skipanina, og at verandi kundar ikki kundu gera nýggjar avtalur.

Elektron hevur síðani stevnt bæði Løgmálaráðnum (nú Innlendismálaráðnum) og Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið er stevnt at viðurkenna, at avgerðin um at avmarka loyvið hjá Elektron til at flyta persónsupplýsingar til útlond ikki hevur heimild í persónsupplýsingarlógini, og at avgerðin vegna vantandi lógarheimild er ógyldig. Bæði Løgmálaráðið og Dátueftirlitið eru stevnd eftir at viðurkenna, at kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 ikki hevur neyðugu heimildina í persónsupplýsingarlógini § 17, stk. 3. Bæði Løgmálaráðið og Dátueftirlitið eru stevnd eftir endurgjaldi í sambandi við fíggjarligan miss.

Elektron hevur síðani latið Dátueftirlitinum umsókn um steðgandi virknað. Avgjørt varð, at Dátueftirlitið onga heimild hevði til at taka støðu um steðgandi virknað. Málið varð lagt fyri Føroya Rætt og 3. februar 2004 gjørdi Føroya Rættur av ikki at geva Elektron viðhald í spurninginum um, at sakarmálið skal hava steðgandi virknað.

Sum áður greitt frá, eru lógarbroytingar framdar í persónsupplýsingarlógini í 2004. Lógarbroytingin hevði m.a. við sær, at § 17, stk. 3, í persónsupplýsingarlógini varð strikað. Henda broyting viðførdi, at kunngerð nr. 94 frá 16. juni 2003 um flutning av persónsupplýsingum til útlond varð sett úr gildi. Tí avgjørdi Dáturáðið á triðja sinni at taka Elekron-málið upp til nýggja viðgerð. Dáturáðið avgjørdi á fundi 26. mai 2004 at taka avgerðina frá 28. oktober 2003 aftur. Loyvið, sum varð givið Elektron til at flyta persónsupplýsingar í gjaldskipanini til PBS í Danmark, varð aftur galdandi uttan avmarkingar.

Føroya Rættur hevur ikki í 2004 tikið avgerð í rættarmálinum millum Elektron og Dátueftirlitið.

# 6 Eftirlitsvitjanir á útvaldum stovnum

Vísandi til § 37, nr. 1, kann Dátueftirlitið av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini. Somuleiðis er ein av ásettu uppgávunum hjá Dátueftirlitinum sbrt. § 37, nr. 5, í persónsupplýsingarlógini at gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar.

Í sambandi við at upplýsingarkervi, sum eru fevnd av lógini, innan 1. september 2004 skulu lúka treytirnar í trygdarkunngerðini, kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003, hevur Dátueftirlitið valt at nýta árið 2004 til at leggja serligan dent á trygdarspurningin. Hetta m.a. við at gera eftirlitsvitjanir, har kannað verður, um reglurnar um trygd í nóg stóran mun verða hildnar í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Dáturáðið gjørdi í 2003 avtalu við Dátueftirlitið í Danmark um samstarv viðvíkjandi eftirliti. Hetta førdi við sær, at eitt starvsfólk frá teknisku deild hjá danska Dátueftirlitinum kom til Føroya og var við umboðnum frá føroyska Dátueftirlitinum, tá eftirlitini vóru framd.

Dátueftirlitið var á fýra eftirlitsvitjanum tann 3. februar 2004. Stovnarnir, ið Dátueftirlitið vitjaði, vóru Blákrossheimið, Toll- og Skattstova Føroya, Almannastovan og Føroya Kærustovnur. Dátueftirlitið sendi stovnunum bræv 14 dagar frammanundan eftirlitinum, har boðað varð frá skránni og endamálinum við eftirlitinum. Leiðbeining til trygdarkunngerðina varð somuleiðis send við í brævinum, eins og sjey spurningar vóru sendir stovnunum.

Hesir spurningar vóru:

a) Hevur stovnurin sett sær trygdarmál?
b) Hevur stovnurin gjørt eina váðameting?
c) Hvørjar persónsupplýsingar viðger stovnurin?
d) Eru reglur um myndugleika- og ábyrgdarbýti gjørdar fyri nýtslu av upplýsingarkervinum?
e) Eru ásetingar gjørdar um starvsfólkanýtslurættin av upplýsingarkervinum?
f) Hava starvsfólk tagnarskyldu?
g) Hvør er trygdin í sambandi við samskifti?

Niðanfyri er greitt nærri frá eftirlitinum á stovnunum.

### 6.1.1 BLÁKROSSHEIMIÐ

Dátueftirlitið var á eftirlitsvitjan á Blákrossheiminum tann 3. februar 2004 og hevði hesar viðmerkingar.

Stovnurin hevði ikki sett sær trygdarmál ella gjørt váðameting. Tó varð arbeitt við hesum. Stovnurin

viðger viðkvæmar persónsupplýsingar. Hetta eru upplýsingar sum navn, bústaður og slag av misnýtslu. Persónsupplýsingarnar verða viðgjørdar á teldu, sum starvsfólkini hava persónlig loyniorð til. Skjalaskráin er tó manuel. Ongar greiðar reglur um myndugleika- og ábyrgdarbýti vóru gjørdar fyri nýtsluna av upplýsingarkervinum. Tó vóru fólk sett av til hetta arbeiðið.

Tær persónsupplýsingar, sum vórðu viðgjørdar á teldu, høvdu starvsfólkini atgongd til. Tó vóru persónsupplýsingar um sjálva rúsmisnýtsluna viðgjørdar manuelt. Sálarfrøðingurin hevði egna skjalaskrá, sum hini starvsfólkini ikki høvdu atgongd til. Henda skjalaskrá var manuel, og upplýsingarnar vóru niðurlæstar. Leiðsla, bókhaldarar og ráðgevar uttanífrá høvdu atgongd til hagtøl.

Starvsfólkini á Blákrossheiminum høvdu persónlig loyniorð, sum tey sjálvi kundu broyta. Summi av starvsfólkunum høvdu atgongd til Internetið. Øll starvsfólkini á stovninum høvdu tagnarskyldu. Eingi dømi eru um, at starvsfólk hava brotið hesa tagnarskyldu.

Blákrossheimið samskiftir um persónsupplýsingar við sjúkrahús og Almannastovuna. Samskiftið er tó ikki elektroniskt, og fer bert fram við samtykki frá viðskiftafólkinum.

Stovnurin samstarvaði við ein samskiftisveitara um gerð av eini trygdarmannagongd.

Dátueftirlitið legði áherðslu á, at Blákrossheimið skuldi arbeiða miðvíst við at gera trygdarmál og eina váðameting, og undirstrikaði, at stovnurin skuldi hava hesi viðurskifti í lagi innan 1. september 2004 sbrt. § 17 í trygdarkunngerðini.

Dátueftirlitið mælti eisini til, at mannagongdir vórðu gjørdar viðvíkjandi nýtslu av Internetinum, umframt at ein meting um trygdarvandar við nýtsluni av Interneti verður gjørd.

### 6.1.2 TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA

Dátueftirlitið var á eftirlitsvitjan á Toll- og Skattstovu Føroya tann 3. februar 2004 og hevði hesar viðmerkingar.

Toll- og Skattstova Føroya hevði sett sær trygdarmál. Hesi vóru gjørd út frá BS7799. Dátueftirlitið fekk eitt avrit av trygdarmálunum. Á Toll- og Skattstovu Føroya vóru tey varug við uppgávurnar viðvíkjandi váðameting. Arbeitt varð við at gera eina váðameting saman við einum samskiftisveitara.

Toll- og Skattstova Føroya viðger persónsupplýsingar sum navn, bústað og inntøku. Toll- og Skattstova Føroya upplýsti, at ætlanir vóru um at seta í verk eina viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum, sum enn ikki var fráboðað Dátueftirlitinum.

Toll- og Skattstova Føroya greiddi frá myndugleika- og ábyrgdarbýtinum í sambandi við nýtslu av kervinum, eins og greitt varð frá logging og atgeingiseftirliti. Einki er skjalfest enn, men arbeitt verður við hesum.

Nýggj starvsfólk verða kunnaði um viðurskifti

viðvíkjandi viðgerð av persónsupplýsingum og um trygdarreglur. Øll nýggj starvsfólk skriva undir skjal um tagnarskyldu.

Toll- og Skattstova Føroya samskiftir millum annað við Almannastovuna, Lønjavningargrunnin, Gjaldstovuna og ALS.

Dátueftirlitið fekk ta fatan, at Toll- og Skattstova Føroya miðvíst arbeiddi við at betra um trygdina á stovninum.

Viðvíkjandi viðkvæmum persónsupplýsingum ásetur persónsupplýsingarlógin, at loyvi skal fáast frá Dátueftirlitinum til slíka viðgerð. Upplýst varð, at Toll- og Skattstova Føroya skuldi søkja um loyvi frá Dátueftirlitinum til ætlaðu viðgerðina. Dátueftirlitið skuldi senda Toll- og Skattstovu Føroya eitt umsóknarblað hesum viðvíkjandi.

### 6.1.3 Almannastovan

Dátueftirlitið var á eftirlitsvitjan á Almannastovuni tann 3. februar 2004 og hevði hesar viðmerkingar til frammanundan settar spurningar.

Almannastovan var byrjað at gera trygdarmál og váðameting. Fólk vóru sett av til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, so at Almannastovan kundi lúka treytirnar í trygdarkunngerðini innan 1. september 2004. Trygdarmálini verða gjørd, grundað á BS7799.

Almannastovan viðger viðkvæmar persónsupplýsingar sbrt. § 2, nr. 9, í persónsupplýsingarlógini. Hetta eru serliga persónsupplýsingar um munandi sosialar trupulleikar. Stovnurin er skipaður í seks økir, ið eru bundin saman við einum telduneti. Fyri at hækka trygdarstøði, integritetstrygd og atgeingi fer Almannastovan at lata teldusambandið ganga ígjøgnum teldumiðstøðina, ið er gjørd í hølunum hjá Landsapotekaranum, har servarar og samskiftisútgerð annars verður miðsavnað og røkt. Almannastovan umhugsar samstarv við IBM um nýtslu av "Tivoli Privacy Manager". Hetta er ein skipan, ið byggir á eina bronglaða databasu.

Øll starvsfólk hava tagnarskyldu. Fyri at gera starvsfólkini varug við hesa tagnarskyldu, skulu deildarleiðararnir innheinta nýggjar váttanir frá starvsfólkunum um tagnarskylduna. Arbeitt verður eisini við innanhýsis undirvísing, har starvsfólk verða kunnaði um lóggávu viðvíkjandi tagnarskylduni. Mannagongdir víðvíkjandi handfaring av persónsupplýsingum eru niðurskrivaðar og tøkar hjá starvsfólkunum.

Almannastovan setti krøv til sínar samskiftitsveitarar um trygd.

Eftirlitsvitjanin endaði við eini sýning av einstøkum skrivstovum og servarahølinum.

Dátueftirlitið mælti til, at einans tilfar, ið er neyðugt til dagliga raksturin av servaranum, verður varðveitt í servarahølinum, men tók annars undir við, at flutt verður til tryggari umstøður.

Dátueftirlitið hevði ta fatan, at Almannastovan miðvíst arbeiddi við, at treytirnar í trygdarkunngerðini skuldu vera uppfyltar innan 1. september 2004. Fólk vóru sett av til

trygdararbeiðið, og stovnurin hevði trygdarmanualir og mannagongdir skjalfestar. Servarin verður fluttur til munandi betri umstøður, enn verandi loysn veitir .

6.1.4 FØROYA KÆRUSTOVNUR

Dátueftirlitið varð á eftirlitsvitjan á Føroya Kærustovni tann 3. februar 2004 og hevði hesar viðmerkingar til frammanundan settar spurningar.

Stovnurin hevði sett sær trygdarmál. Hetta arbeiðið byrjaði fyri einum ári síðani, og var hetta liðugt. Stovnurin var í gongd við at gera váðameting, henda var tó ikki liðug. Føroya Kærustovnur helt tó, at tann fysiska trygdin innanhýsis kundi verið betri. Samarbeitt varð við uttanhýsis KT-veitara um trygdina.

Føroya Kærustovnur viðger persónsupplýsingar um sosial viðurskifti, heilsustøðu og búskaparlig viðurskifti. Allar persónsupplýsingar, sum verða viðgjørdar, eru partur av tí vanligu málsviðgerðini.

Føroya Kærustovnur er ein lítil stovnur við fáum starvsfólkum. Tí hevur Kærustovnurin felags teldukervi saman við øðrum stovnum, sum eru í sama bygningi.

Við tað at fá starvsfólk eru á stovninum, hava øll starvsfólk atgongd til allar upplýsingar. Tó verða persónsupplýsingar um starvsfólkaviðurskifti viðgjørdar í einari serstakari skjalaskrá.

Øll starvsfólk hava tagnarskyldu. Starvsfólkini verða kunnaði um hetta, tá ið tey verða sett í starv.

Aftaná at fundur hevur verið við tær ymisku kærunevndirnar, verða skjølini frá fundinum savnaði saman aftur og makulerað.

Eftirlitsvitjanin endaði við eini sýning av skrivstovunum og servararhølinum.

Dátueftirlitið mælti til, at stovnurin brongladi persónsupplýsingar, tá ið neyðugt var at senda avgerðir og annað tilfar við viðkvæmum persónsupplýsingum elektronisk til limirnar í teimum ymisku kærunevndunum.

Dátueftirlitið mælti eisini til, at einans tilfar, ið er neyðugt til dagliga raksturin av servaranum, verður varðveitt í servarahølinum.

# 7 Altjóða samstarv

Tað, sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt umfatandi altjóða samarbeiði. Hetta samarbeiðið er neyðugt og av stórum týdningi, orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á EF fyriskipan 95/46EF frá 24.10.1995 um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum landanna millum. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari vælveru hjá tí einstaka og øktum samhandli millum londini. Við tað at persónsupplýsingar frítt kunnu flytast millum limalondini í Europasamveldinum, er tørvur á einum góðum samstarvi landanna millum, ið kann tryggja, at persónsverndaratlitini í øllum limalondunum er á sama støði.

## 7.1 NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram ímillum dátueftirlitini í Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi og Svøriki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum. Føroyska Dátueftirlitið hevur ikki enn verið partur av hesum samstarvi. Tó hevur Dátueftirlitið eitt ávíst samstarv við dátueftirlitini í Danmark, Íslandi og Noregi, sum Dátueftirlitið javnan vendir sær til, tá ivaspurningar eru í ymiskum málsviðgerðum. Dátueftirlitið vónar, at hetta fer at vera við til at styrkja um samstarvið við Norðurlondini.

Dátueftirlitið gjørdi, sum úrslit av hesum samstarvi, í 2003 eina avtalu við danska Dátueftirlitið um samstarv, tá Dátueftirlitið fremur eftirlit. Henda avtala varð gjørd, tí Dátueftirlitið í løtuni ikki hevur karmar til at hava serstakt fólk í starvi við tí neyðuga serkunnleikanum til tøkni, ið krevst, tá eftirlit verður framt. Eitt umboð frá tí teknisku deildini í danska Dátueftirlitinum var við, tá Dátueftirlitið í februar 2004 var á sínum fyrstu eftirlitsvitjanum.

Dátueftirlitið varð eisini, sum úrslit av samstarvinum við Dátueftirlitið í Íslandi, á fyrsta sinni boðið við til tann árliga norðurlendska málsviðgerarfundin, ið varð hildin í Reykjavík í apríl mánaði 2004. Vegna ov stóra arbeiðsbyrðu fekk Dátueftirlitið tíanverri ikki verið við til henda fund, men segði Dátueftirlitið seg vera áhugað at taka lut í slíkum komandi fundum. Næsti fundur verður hildin í Keypmannahavn í 2005, og tá verður væntandi umboð frá Dátueftirlitinum við.

Á hesum málsviðgerarfundum kunnu tey ymisku umboðini leggja evni fram til umrøðu innan viðgerð av persónsupplýsingum. Í 2004 vóru evnini m.a. talgildar sjúklingaskráir, persónsupplýsingar og Internet, samankoyringar av persónsupplýsingum, lívmátiligar upplýsingar og samtykki í sambandi við granskingarverkætlanir. Eisini hevur hvørt dátueftirlit eina framløgu, har greitt verður nærri frá teimum málum, sum hava havt serligan týdning í tí farna árinum. Fundirnir eru gagnligir fyri tey ymsu dátueftirlitini, tí at høvi er at fáa kunnleika til, hvønn leist tey ymisku dátueftirlitini nýta í sínum málsviðgerðum.

## 7.2 HÁTÍÐARHALD Í DANMARK

Dátueftirlitið fekk í farna ári eina innbjóðing frá danska Dátueftirlitinum til eitt 25-ára hátíðarhald. Danir hildu hetta hátíðarhald í sambandi við, at tað vóru 25 ár síðan, at Danmark á fyrsta sinni fekk lóggávu um vernd av persónsupplýsingum, hetta vóru tær sonevndu skrásetingarlógirnar, sum á fyrsta sinni vóru settar í gildi i januar 1979. Í Føroyum vóru hesar somu skrásetingarlógir galdandi, áðrenn persónsupplýsingarlógin varð lýst í 2001.

Í sambandi við hátíðarhaldið skipaði danska Dátueftirlitið fyri eini ráðstevnu, har dentur varð lagdur á ymisk evnir innan vernd av persónsupplýsingum. Ráðstevnan var skipað á tann hátt, at evnini vórðu løgd fram sum stuttar hugleiðingar, ið endaðu við pallborðskjaki. Evnini vóru m.a. vernd av persónsupplýsingum hví og hvussu, persónsupplýsingarlógin mótvegis sjúku- og heilsugransking, vernd av persónsupplýsingum í altjóða fyritøkum, ymisk evni innan eftirlit og framtíðar vernd av persónsupplýsingum. Sera stórur áhugi var fyri hesi ráðstevnu, har bæði privatar fyritøkur, almennir myndugleikar, politikarar o.o. luttóku. Við á ráðstevnuni vóru uml. 150 luttakarar, herímillum fulltrúin á Kitty May Ellefsen Dátueftirlitinum.

# 8 Givin loyvi í 2004

Í hesum parti av frágreiðingini eru listar við teimum loyvum, sum Dátueftirlitið hevur givið í 2004. Dátueftirlitið hevur skyldu til sbrt. § 37, nr. 3, í persónsupplýsingarlógini at hava ein almennan skipaðan lista yvir allar fráboðanir og loyvi sambært lógini. Hesin listi liggur á heimasíðuni.

Listin er býttur upp í 3. partar: viðgerðarloyvi til viðkvæmar persónsupplýsingar, loyvi at flyta persónsupplýsingar av landinum, og tey loyvi, sum eru givin til longri tillagingartíð til freistina í trygdarkunngerðini.

## *8.1* LOYVI, GIVIN TIL VIÐGERÐ AV VIÐKVÆMUM PERSÓNSUPPLÝSINGUM

**J.nr. 20040006**

**Dátuábyrgdari**

Regin Ellingsgaard, KT-leiðari
KT-depilin
Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Samhøll - samskiftisskipan skúlaverksins

**Endamál**

Við skipanini at menna samskiftið millum brúkarar í skúlaverkinum og at nýta í undirvísingarhøpi

**Skrásett**

Lærarar, næmingar og onnur við tilknýti til skúlaverkið

**Slag av persónsupplýsingum**

Navn, kyn, føðingardagur og -ár
Upptøkuár og flokkur
Yrkisfelagsligt tilknýti

**Tíðarskeið**

Frá mars 2004

**Viðgerðarloyvi**

10-03-2004

---

**J.nr. 20040009**

**Dátuábyrgdari**

Maria Skaalum Petersen
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Sambandið millum dálkandi evni í umhvørvinum og aldur

**Endamál**

Kanna sambandið millum dálkandi evni í umhvørvinum og aldur við at taka blóðroynd fyri at kanna PCB og kviksilvur innihaldið

**Skrásett**

200 føroyingar yvir 60 ár, tilvildarliga útvaldir

**Slag av persónsupplýsingum**

Heilsustøða

Blóð- og hárroynd

**Tíðarskeið**

Mai 2004 til mai 2005

**Viðgerðarloyvi**

13-05-2004

---

**J.nr. 20040056**

**Dátuábyrgdari**

Pál Weihe, yvirlækni
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Hagtalsviðgerð av CYP2D6 kveikavirkni

**Endamál**

Kanna CYP2D6 kveikavirkni hjá føroyskum sjúklingum, sum annaðhvørt fáa tricyklisk antidepressiva ella tramdol útskrivað

**Skrásett**

Sjúklingar, sum eru í viðgerð við tricykliskum antidepressiva (TCA) og tramdol

**Slag av persónsupplýsingum**

Heilsustøða

Blóðroynd

**Tíðarskeið**

November 2004 til november 2005

**Viðgerðarloyvi**

19-05-2004

---

**J.nr. 20040008**

**Dátuábyrgdari**

Pál Weihe, yvirlækni
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Heilsuviðurskifti hjá langfarafiskimonnum

**Endamál**

Lýsa heilsustøðuna hjá langfarafiskimonnum og teirra lívsstíli

**Skrásett**

150 langfarafiskimenn, serliga útvaldir

**Slag av persónsupplýsingum**

Blóð, spýtt og land

Likamshædd, vekt og blóðtrýst

Heilsustøða

**Tíðarskeið**

Januar 2004 til desember 2005

**Viðgerðarloyvi**

25-05-2004

---

**J.nr. 20040016**

**Dátuábyrgdari**

Maria Skaalum Petersen
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Kviksilvurávirkan á lívslongd

**Endamál**

Kanna hvørja ávirkan kviksilvur hevur á lívslongd við at gera eina deyðiligheitskanning

**Skrásett**

Fólk, fødd í 1930 og 1932

**Slag av persónsupplýsingum**

Navn á móður, føðistaður/bústaður, føðingardagur hjá barni, burðarvekt, longd og møgulig deyðsorsøk

**Tíðarskeið**

2. juli 2004 til 2. juli 2005

**Viðgerðarloyvi**

02-07-2004

8.2 LOYVI, GIVIN TIL AT FLYTA PERSÓNSUPPLÝSINGAR AV LANDINUM

**J.nr. 20040009**

**Dátuábyrgdari**

Maria Skaalum Petersen
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Sambandið millum dálkandi evni í umhvørvinum og aldur

**Endamál**

Kanna sambandið millum dálkandi evni í umhvørvinum og aldur við at taka blóðroynd fyri at kanna PCB og kviksilvurinnihaldið

**Skrásett**

200 føroyingar yvir 60 ár, tilvildarliga útvaldir

**Slag av persónsupplýsingum**

Heilsustøða
Blóð- og hárroynd

**Tíðarskeið**

Mai 2004 til mai 2005

**Loyvi at flyta persónsupplýsingar av landinum**

13-05-2004

---

**J.nr. 20040056**

**Dátuábyrgdari**

Pál Weihe, yvirlækni
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**

Hagtalsviðgerð av CYP2D6 kveikavirkni

**Endamál**

Kanna CYP2D6 kveikavirkni hjá føroyskum sjúklingum, sum annaðhvørt fáa tricyklisk antidepressiva ella tramdol útskrivað

**Skrásett**

Sjúklingar, sum eru í viðgerð við tricykliskum antidepressiva (TCA) og tramdol

**Slag av persónsupplýsingum**

Heilsustøða
Blóðroynd

**Tíðarskeið**

November 2004 til november 2005

**Loyvi at flyta persónsupplýsingar av landinum**

19-05-2004

---

**J.nr. 03-5550-0000**

**Dátuábyrgdari**

Innlendismálaráðið
Landsfólkayvirlitið
Tinganes

Postboks 159
FO-110 Tórshavn

**Heiti**
Landsfólkayvirlit

**Endamál**
At føra landsfólkayvirlit sbrt. lóg um fólkayvirlit

**Skrásett**
Persónar, ið búgva ella hava búð í Føroyum

**Slag av persónsupplýsingum**
Navn, yrki
Bústaður, uttan so at hesin er vardur
Upplýsing um, at fólk hevur mist sjálvræðið, er deytt, horvið ella flutt av landinum

**Tíðarskeið**
Frá oktober 2004

**Loyvi at flyta persónsupplýsingar av landinum**
12-10-04

---

**J.nr. 20040051**

**Dátuábyrgdari**
Sámal J. Samuelsen, fíggjarleiðari
Sjónvarp Føroya
M.A. Winthersgøta 2
Postboks 21
FO-110 Tórshavn

**Heiti**
Gekkur

**Endamál**
Flyta gjald fyri keyp av gekkaseðlum frá konto brúkarans til SVF

**Skrásett**
Viðskiftafólk, brúkarar

**Slag av persónsupplýsingum**
Eyðmerkingarupplýsingar

**Tíðarskeið**
Frá oktober 2004

**Loyvi at flyta persónsupplýsingar av landinum**
15-10-04

---

**J.nr. 20040075**

**Dátuábyrgdari**
Pál Weihe, yvirlækni
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sigmundargøta 5
Postboks 14
FO-110 Tórshavn

**Heiti**
Heilsuviðurskifti hjá langfarafiskimonnum

**Endamál**
Lýsa heilsustøðuna hjá langfarafiskimonnum og teirra lívsstíli

**Skrásett**
150 langfarafiskimenn, serliga útvaldir

**Slag av persónsupplýsingum**
Blóð, spýtt og land
Likamshædd, vekt og blóðtrýst
Heilsustøða

**Tíðarskeið**
Januar 2004 til desember 2005

**Loyvi at flyta persónsupplýsingar av landinum**
15-12-2004

8.3 LOYVI, GIVIN TIL LONGRI TILLAGINGARTÍÐ AT LÚKA KRØVINI Í TRYGDARKUNNGERÐINI

**J. nr 20040037**

**Stovnur**

Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
FO-110 Tórshavn

**Nýggj freist**

31. august 2005

---

**J. nr 20040039**

**Stovnur**

Almannastovan
J. Broncksgøta 27
Postsmoga 3096
FO-110 Tórshavn

**Nýggj freist**

1. apríl 2005

---

**J. nr 20040042**

**Stovnur**

Rúsdrekkasøla Landsins
Hoyvíksvegur 51
Postsmoga 3069
FO-110 Tórshavn

**Nýggj freist**

1. september 2005

---

**J. nr 20040043**

**Stovnur**

Toll- og Skattstova Føroya
Traðagøta 39
FO-160 Argir

**Nýggj freist**

31. august 2005

---

**J. nr 20040046**

**Stovnur**

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 17-19
Postsmoga 347
FO-110 Tórshavn

**Nýggj freist**

1. februar 2005

---

**J. nr 20040052**

**Stovnur**

Innlendismálaráðið
Tinganes
Postsmoga 159
FO-110 Tórshavn

**Nýggj freist**

31. desember 2005

---

**J. nr 20040053**

**Stovnur**

Ferðaráð Føroya
Undir Bryggjubakka 17
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

**Nýggj freist**

1. apríl 2005

**J. nr 20040054**

**Stovnur**

Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

**Nýggj freist**

30. juni 2006

**J. nr 20040060**

**Stovnur**

Fiskivinnuskúlin

# Skjal 1: Reglugerð fyri Dátueftirlitið

FO-350 Vestmanna

**Nýggj freist**

8. juni 2005

Sambært løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum § 36, stk. 4, verður ásett:

§ 1.

Stk. 1. Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu. Ráðið telur 3 limir, formannin, sum er løgfrøðingur, og tveir limir afturat. Limirnir verða valdir fyri 4 ár. Knýtt at ráðnum er avgreiðsluskrivstovan við stjóra og øðrum starvsfólki.

Stk. 2. Fíggjarligu viðurskiftini hjá Dátueftirlitinum verða avgreidd samsvarandi roknskaparreglugerð, sum Dáturáðið hevur samtykt.

§ 2.

Ráðið viðger og tekur avgerð um:

Mál av serligum týdningi (prinsippmál)

Mál av stórum almennum áhuga, ella sum fáa stórt árin á alment ella privat virksemi o.a.

Mál, sum eru ivingarsom

Mál, sum ráðslimur ynskir, at ráðið viðger

Mál, sum av øðrum orsøkum eiga at avgerast av ráðnum

Stk. 2. Onnur mál verða viðgjørd og avgjørd av skrivstovuni.

Stk. 3. Mál, sum fevnd eru av stk. 1, pkt. 1-5, og sum ikki tola at bíða til ráðsfundur verður, verða avgjørd av skrivstovuni í samráð við nevndarleiðaran, men skulu skjótast gjørligt leggjast fyri ráðið.

§ 3

Ráðið ásetur, nær fundur skal vera, og verður fundur annars, tá ið formaðurin heldur tørv vera á tí, ella um tveir limir biðja um fund.

Stk. 2. Ráðsformaðurin fyrireikar í samstarvi við skrivstovuna tey mál, sum viðgerast skulu á ráðsfundum og leiðir fundirnar. Skrivstovan fyrireikar fundirnar, gevur fundarboð við dagsskrá og viðleggur neyðug skjøl.

Stk. 3. Berst formanninum frá at møta á fundi, velur ráðið millum limir sínar ein næstformann.

Stk. 4. Skrivstovustjórin og eisini onnur á skrivstovuni kunnu eftir avgerð stjórans luttaka á ráðsfundum.

Stk. 5. Um limi ikki ber til at møta á fundi í longri tíð, kann formaðurin heita á landsstýrismannin, um at velja eykalim í staðin fyri viðkomandi.

§ 4

Fundurin er viðtøkuførur, tá ið formaðurin ella næstformaðurin og ein limur afturat eru á fundi.

Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða leiðarans avgerandi.

Stk. 2. Ráðið kann boðsenda serkønum, tá hetta verður hildið neyðugt til málsviðgerðina, eins og onnur, sum hava serligan áhuga í einum máli, kunnu fáa høvi at møta á fundi og geva frágreiðing til tess at lýsa málið betur.

Stk. 3. Eftir fundin verður fundarfrásøgn gjørd, sum verður góðkend á næsta fundi. Er atkvøtt, skal greiðast frá hesum. Ein minniluti kann krevja sína áskoðan tilskilaða.

Stk. 4. Frásagnir frá ráðsfundum eru ikki alment atgongdar.

§ 5

Ráðslimur kann ikki luttaka í avgerð ella viðgerð av einum máli, sum viðkomandi hevur persónlig áhugamál í, ella um viðurskifti fyriliggja, ið kunnu sáa iva um uttanveltaðu støðuna hjá viðkomandi.

Stk. 2. Heldur limur, at viðurskifti eru, sum kanska eru fevnd av stk. 1, so eigur viðkomandi, áðrenn málið verður viðgjørt í ráðnum, at greiða leiðaranum frá hesum.

Stk. 3. Ráðið avger endaliga, um limurin kann luttaka í viðgerðini og avgerðini í málinum. Í hesi viðgerð og avgerð luttekur viðkomandi ikki.

§ 6

Ráðslimur hevur tagnarskyldu um tær trúnaðarupplýsingar, sum kunnleiki fæst um sum limur í Dáturáðnum og hevur annars tagnarskyldu eftir vanligum reglum um málsviðgerð, galdandi innan almennu umsitingina. Sama tagnarskylda er galdandi fyri starvsfólk á Dátueftirlitinum, sum luttaka í málsviðgerð.

Stk. 2. Ráðslimur skal ansa eftir, at tilfar sum verður fingið í sambandi við hetta virksemið, ikki kemur óviðkomandi í hendi.

Stk. 3. Tá ið limur fer úr Dáturáðnum, skal tilfar, sum fingið er í starvinum, latast aftur til avgreiðsluskrivstovuna.

# Skjal 2: Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum fyri 2002 - 2004

Dátueftirlitið, tann 27. aug. 2002.

*Sundurgreinað ætlan*

| **Tús. kr.** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|
| | **J + EYJ** | **J** | **J** |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **987** | **1.006** | **912** |
| Lønir o.a. | 643 | 662 | 650 |
| Keyp av vørum og tænastum | 160 | 160 | 126 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 148 | 148 | 100 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 36 | 36 | 36 |

# Skjal 3: Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003

- UM TRYGD Í SAMBANDI VIÐ VIÐGERÐ AV PERSÓNSUPPLÝSINGUM

Við heimild í § 31, stk. 7, í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum verður ásett:

ØKI OG ENDAMÁL

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri heilt ella lutvíst elektroniska viðgerð av persónsupplýsingum fyri privat og fyri tað almenna, har tað er neyðugt, til tess at forða fyri missi av lív og heilsu, fíggjarligum tapi ella missi av umdømi, persónliga frælsinum og heimafriðinum at tryggjað trúnað, atgongd til og heild í upplýsingunum. Har slíkur vandi er, skulu tey miðvísu og ætlaðu tiltøkini, sum verða sett í verk sambært hesi kunngerð, vera í mun til møguleikan fyri og avleiðingarnar av trygdarbroti.

ÁLEGGINGAR FRÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**§ 2.** Dátueftirlitið kann áleggja einum dátuábyrgdara at tryggja persónsupplýsingar og her áseta mørk fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

TRYGDARLEIÐSLAN

**§ 3.** Tann, sum hevur dagligu leiðsluna í virkinum, stovninum o.ø. hjá dátuábyrgdaranum, hevur ábyrgdina av, at ásetingarnar í hesi kunngerð verða fylgdar.

*Stk. 2.* Trygdarmál skulu setast, har endamálið við viðgerðini av persónsupplýsingum skal lýsast, og somuleiðis skulu yvirskipaðar reglur fyri nýtslu av kunningartøkni lýsast.

*Stk. 3.* Í eini trygdarstrategi skulu raðfestingar og val í trygdararbeiðinum lýsast.

*Stk. 4.* Eftirmetingar skulu gerast minst eina ferð árliga fyri at meta um, um nýtslan av upplýsingakervinum er hóskandi samanborið við tørvin hjá virkinum, stovninum o.ø., og um trygdarstrategiin veitir nøktandi trygd.

*Stk. 5.* Úrslitið av eftirmetingunum skal skjalfestast og nýtast sum grundarlag, skulu møguligar broytingar gerast í trygdarmálum ella trygdarstrategi

VÁÐAMETING

**§ 4.** Yvirlit skal gerast yvir, hvørji sløg av persónsupplýsingum verða viðgjørd. Dátuábyrgdarin skal áseta mørk fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin skal gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiðu á sannlíkindum fyri broti á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av hesum.

*Stk. 3.* Verða broytingar gjørdar, sum hava týdning fyri trygdina, skal nýggj váðameting verða gjørd.

*Stk. 4.* Úrslitið av váðametingunum skal samanberast við ásettu mørkini fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast sbr. § 2.

*Stk. 5.* Úrslitið av metingunum skal skjalfestast.

TRYGDARSKOÐAN

**§ 5.** Trygdarskoðan av nýtsluni av upplýsingakervinum skal gerast minst 1 ferð árliga. Skoðanin skal fevna um meting av fyriskipan, trygdartiltøkum og nýtslu av samskiftisfelagum og veitarum.

*Stk. 2.* Kemur fram í sambandi við skoðan av trygdini, at óætlað nýtsla er, skal hetta viðgerðast sum frávik sbr. § 6.

*Stk. 3.* Úrslitið av skoðanini skal skjalfestast.

FRÁVIK

**§ 6.** Trygdarbrot eins og nýtsla, sum ikki er í samsvar við skipaðar mannagongdir, vegleiðingar .t., skal viðgerðast sum frávik.

*Stk. 2.* Endamálið við viðgerð av frávikum eigur at vera at fáa vanligu viðgerðina av persónsupplýsingum í rætt lag aftur, rætta orsøkina til frávikið og forða fyri endurtøku.

*Stk. 3.* Eru trúnaðarupplýsingar útflýggjaðar orsakað av frávikinum, og hesar ikki eru loyvdar at útflýggja, skal dátueftirlitið fráboðast.

*Stk. 4.* Viðgerð av frávikum skal skjalfestast.

FYRISKIPAN

**§ 7.** Greiðar reglur um myndugleika- og ábyrgdarbýti skulu gerast fyri nýtslu av upplýsingakervinum.

*Stk. 2.* Myndugleika- og ábyrgdarbýti skal skjalfestast og skal ikki broytast uttan góðkenning frá leiðsluni hjá dátuábyrgdaranum.

*Stk. 3.* Upplýsingakervið skal byggjast soleiðis upp, at trygdin er nøktandi. Hvussu upplýsingarkervið er uppbygt skal skjalfestast og skal ikki broytast uttan góðkenning frá tí, sum hevur dagligu leiðsluna í virkinum, stovninum o.ø. hjá dátuábyrgdaranum.

*Stk. 4.* Nýtsla av upplýsingakervinum, sum hevur týdning fyri trygdina, skal verða sambært ásettum mannagongdum, vegleiðingum o.t.

STARVSFÓLK

**§ 8.** Starvsfólk hjá dátuábyrgdara skulu bert nýta upplýsingakervið til tess at útinna álagdar uppgávur, og starvsfólkini skulu hava nýtslurættindi í sambandi við útinnan av neyðugum arbeiðsuppgávum.

*Stk. 2.* Starvsfólk skulu hava neyðugan førleika at nýta upplýsingakervið í samsvari við ásettar mannagongdir, vegleiðingar o.t.

*Stk. 3.* Nýtslurættindi til upplýsingakervið skulu skrásetast.

TAGNARSKYLDA

**§ 9.** Har trúnaður er neyðugur, skulu starvsfólk hjá dátuábyrgdara hava tagnarskyldu. Tagnarskyldan fevnir eisini um aðra upplýsing av týdningi fyri trygdina.

FYSISK TRYGD

**§ 10.** Trygdartiltøk skulu setast í verk fyri at forða óviðkomandi í at fáa atgongd til útgerð, sum verður nýtt til viðgerð av persónsupplýsingum.

*Stk. 2.* Trygdartiltøkini skulu somuleiðis forða óviðkomandi í at fáa atgongd til aðra útgerð av týdningi fyri trygdina.

*Stk. 3.* Útgerð skal leggjast inn á tílíkan hátt, at ávirkan uttanífrá ikki fær týdning fyri viðgerð av persónsupplýsingum.

TRYGGJAN AV TRÚNAÐARUPPLÝSINGUM

**§ 11.** Trygdartiltøk skulu setast í verk fyri at forða óviðkomandi í at fáa innlit í persónsupplýsingar, sum skulu viðgerast í trúnaði.

*Stk. 2.* Trygdartiltøk skulu somuleiðis forða óviðkomandi í at fáa innlit í aðrar upplýsingar av týdningi fyri trygdina.

*Stk. 3.* Persónsupplýsingar, sum verða fluttar elektroniskt við flutningsmiðlum uttan fyri fysiska eftirlitið hjá dátuábyrgdara, skulu bronglast ella tryggjast á annan hátt, um trúnaður er neyðugur.

*Stk. 4.* Fyri goymslumiðlar við persónsupplýsingum, har trúnaður er neyðugur, skal tørvurin á trúnaði síggjast t.d. við frámerki á miðlinum.

*Stk. 5.* Verður goymslumiðilin ikki longur nýttur til tílíkar upplýsingar, skulu upplýsingarnar strikast á goymslumiðlinum.

## TRYGGJAN AV ATGONGD

**§ 12.** Tiltøk skulu setast í verk fyri at tryggja, at atgongd er til persónsupplýsingar, sum skulu vera tøkar.

*Stk. 2.* Tiltøkini skulu somuleiðis tryggja atgongd til aðrar upplýsingar av týdningi fyri trygdina.

*Stk. 3.* Fæst ikki vanlig atgongd til upplýsingakervið, skulu aðrir møguleikar fyri viðgerð verða tøkir, soleiðis at neyðug nýtsla kann fara fram.

*Stk. 4.* Persónsupplýsingar og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at fáa nýtsluna í gongd aftur, skulu avritast.

## TRYGGJAN AV SONNUM UPPLÝSINGUM

**§ 13.** Tiltøk skulu setast í verk fyri at forða fyri, at broytingar verða gjørdar í persónsupplýsingum, har broytingar ikki eru loyvdar, og har heildin í upplýsingunum er neyðug fyri at tryggja, at upplýsingarnar eru sannar.

*Stk. 2.* Trygdartiltøkini skulu somuleiðis forða, at broytingar verða gjørdar í øðrum upplýsingum, har broytingar ikki eru loyvdar, og upplýsingarnar hava týdning fyri trygdina.

*Stk. 3.* Tiltøk skulu setast í verk at verja ímóti oyðileggjandi forritum.

## TILTØK Í SAMBANDI VIÐ IKKI LOYVDA NÝTSLU

**§ 14.** Trygdartiltøk skulu forða fyri ikki loyvdari nýtslu av upplýsingakervinum, og trygdartiltøk skulu gera tað møguligt at uppdaga slíkar royndir.

*Stk. 2.* Royndir uppá ikki loyvda nýtslu á upplýsingakervið skulu skrásetast.

*Stk. 3.* Trygdartiltøkini skulu fevna um tiltøk, sum starvsfólkini ikki kunnu fáa ávirkan á ella fara uttanum, og tiltøkini skulu ikki vera avmarkað til gerðir, sum hvør einstakur kann væntast at gera.

*Stk. 4.* Trygdartiltøkini skulu skjalfestast.

## TRYGD Í SAMBANDI VIÐ SAMSKIFTI

**§ 15.** Dátuábyrgdari eigur bert at flyta persónsupplýsingar elektroniskt til tann, sum lýkur krøvini í hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdari kann tó flyta persónsupplýsingar til tann, sum sambært lóg hevur heimild at krevja upplýsingar úr almennari skrá, ella um flutningurin hevur heimild í ásetingunum um flutning av persónsupplýsingum til útlond í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.

*tk. 3.* Veitarar, sum seta í verk trygdartiltøk ella á annan hátt nýta upplýsingakervið vegna datuábyrgdara, skulu lúka krøvini í hesi kunngerð.

*Stk. 4.* Dátuábyrgdari skal seta greið krøv til myndugleika- og ábyrgdarbýti hjá

samskiftisfelagum og veitarum. Myndugleika- og ábyrgdarbýti skulu lýsast í serligari avtalu.

*Stk. 5.* Dátuábyrgdari skal kunna seg um trygdarstrategiirnar hjá samskiftisfelagum og veitarum og javnan tryggja sær, at hesar eru nøktandi.

SKJALFESTING

**§ 16.** Mannagongdir, vegleiðingar o.t í sambandi við nýtslu av upplýsingakervinum og aðrar upplýsingar av týdningi fyri trygdina, skulu skjalfestast.

*Stk. 2.* Skjalfestingin skal goymast í minsta lagi í 5 ár frá tí degi, at nýtt galdandi skjal kemur í staðin fyri gamla skjalið.

*Stk. 3.* Skráseting av nýtslu av upplýsingakervinum, sum er loyvd eins og skráseting av nýtslu, sum ikki er loyvd, skal goymast í minsta lagi í 12 mánaðir. Sama er galdandi fyri skráseting av øllum øðrum tilburðum av týdningi fyri trygdina.

GILDISKOMA

**§ 17.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Upplýsingakervi, sum eru fevnd av lógini, skulu innan 1. september 2004 lúka treytirnar í hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Dátueftirlitið kann í serligum føri geva loyvi til eina longri tillagingartíð enn nevnt í stk 1., tó í mesta lagi tvey ár, og bert um vísast kann á tilskilaða ætlan yvir, hvussu krøvini í kunngerðini væntandi verða lokin.

Løgmálaráðið, 27. februar 2003

Høgni Hoydal, (sign.)
landsstýrismaður
/Rúni Joensen, (sign.)